

*Tróndur Enni, Neil Joensen og Kim Hansen heilsaðu vinnaranum av M.A. Jacobsens virðisløn fyri mentanaravrik Annu Kirstin Thomsen við sanginum »Av fólki sum ter«*



# Filosofiskar barnabøkur

Barnabókavirðisløn Tórshavnar býráðs fekk Marjun Syderbø Kjelnæs fyri bøkurnar "Hvør fjalir seg í postkassanum?" og "Hvør fjalir seg í ferðataskuni?"

Grundgevingin hjá dómsnevndini ljóðaði soleiðis:

Rithøvundurin Marjun Syderbø Kjelnes hevur við bókunum "Hvør fjalir seg í postkassanum?" og "Hvør fjalir seg í ferðataskuni?" bjóðað einum forvitnum lesaraskara av. Børnum dámar hesi spurnarheiti, ið leggja seg upp at eini spennandi søgugongd.

Marjun skrivar við hendinga góðum hugflogi. Hon er á tremur við góðum, stuttligum og spennandi frásøgnum. Hon lýsir og menniskjansger lítlar verur ella pinkur, ið fjala seg, hóast tær eru komnar higar heilt av Jamaika. Pinkur kunnu eisini vera við til at gera mun og loysa gerandistrupulleikar.

Boðskapurin í bókunum hevur ein farra av filosofi, sum er sera beinrakin. Marjun Syderbø Kjelnæs er ein fongur í barnabókmentum okkara. Beinraknu søgurnar um pinkuverur eru væl funnar uppá.



# Sermerkti myndprýðarin

Hanni Bjartalíð fekk Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs fyri at hava myndprýtt bøkurnar "Hvør fjalir seg í postkassanum?" og "Hvør fjalir seg í ferðataskuni?"

Í grundgevingini vísir dómsnevndin á, at myndprýðarin og teknarin Hanni Bjartalíð í mong ár hevur verið sjónligur í føroyskum barnabókum við sínum sermerktu, sigandi og berandi søgumyndum.

Í bókunum "Hvør fjalir seg í postkassanum?" og "Hvør fjalir seg í ferðataskuni?" skarar listamaðurin Hanni Bjartalíð framúr. Hann skapar saman við søguskrivaranum eina hendingaríka og merkisverda søgu, har sterku og litríku tekningarnar lyfta góðu søgugongdina upp á eitt hægri stig.

Hanni Bjartalíð dugir hendinga væl einfalda, barnakenda myndagerð. Samstarv og samsvar millum høvund og teknara er fyrimyndarligt. Eyðsýndar smálutir, ið tekkjast smáum sum stórum, megnar Hanni við listarligum strokum at fáa fram til lesaran og eygleiðaran.

Á myndini sæst Niels Jákup Thomsen taka móti virðislønini í Mullers Pakkhúsi í dag. Niels Jákup er leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags, ið gav bøkurnar út, sum Hanni Bjartalíð, ið býr í Finnlandi, myndprýddi.



# Forkunnug bók um veðrið

Tað gjørdist Hanus Kjølbro sum fekk virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir fyri bókina Veðurlæra

Í grundgevinginini segði dómsnevndin millum annað:

At duga at skyna á veðri og sjóvarfalli hevur í øldir verið avgerandi fyri lív og trivnað í Føroyum, og neyv vitan á hesum øki hevur altíð verið høgt í metum. Við "Veðurlæru" hevur Hanus givið øllum føroyingum ein góðan møguleika at læra um øll hesi viðurskifti á greiðum og góðum føroyskum máli og við frálíkum heimligum myndum og sigandi tekningum.

Umframt at greiða frá veðri og havi við Føroyar greiðir Hanus okkum eisini frá veður- og havviðurskiftum aðrastaðni, líka frá pólísinum til tropisku ódnirnar og frá uttasta lagnum á hválvinum niður til djúpastu havstreymar.